| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>15. desember 2005 | Blað nr.:<br>**6408** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **15. desember 2005**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **266/05-290/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Kári Árting
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Inga Dahl
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna og bað um góðkenning av skránni, og at tvey eykamál komu við, nevniliga**

**mál nr. 289/05, j. nr. 2001-0407, Atkomuvegur til Havnar og**
**mál nr. 290/05, j. nr. 2001-1587, Sankta Frants - nýbygging av smábarnaskúla**

6 býráðslimir, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Inga Dahl, mótmæltu, at mál nr. 289/05 kom á skrá við hesum viðmerkingum:

**Viðmerkingar frá minnilutanum til eykamálið: "Atkomuvegur til Havnar":**

Minnilutin, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Inga Dahl mótmæla harðliga, at eitt so týdningarmikið mál, sum "Atkomuvegur til Havnar" verður sett sum eykamál til býráðsfundin.

Minnilutin vísir til kommunulógina og fundarskipanina fyri Tórshavnar Býráð um innkalling til býráðsfund. Minnilutin vísir eisini á, at málslýsingin er mest sum einki sigandi, og at boðini um hetta eykamál komu við alt ov stuttari fráboðanartíð. Víst verður eisini til, at ein minnilutabýráðslimur hevur als ikki fingið boð um eykamálini.

Sjúrður Olsen og Jan Christiansen boða frá, at framferðin móti minnilutanum er so mikið niðursetandi, at teir valdu at boykotta býráðsfundin og fóru av fundinum

Jan Christansen, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen fóru av fundi.

**266/05** **<u>2005-0017</u>**

**<u>Marin Katrina Frýdal hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar</u>.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kári Árting, eru loknar.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt.

**267/05** **2005-0038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Tikið til eftirtektar.

**268/05** **2005-1661 (2005-1664)**

**Uppskot til broytingar í reglugerð fyri upptøku og viðgerð á grundstykkja-listanum fyri sethús og raðhús.**

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at samtykkja hjálagda uppskot til reglugerð fyri bíðilista til grundstykki og íbúðir.

Somuleiðis verður mælt til at góðkenna uppskotið til broyttar umsitingarligar reglur fyri grundstykki og raðhús, tó við teirri ískoytisbroyting, at heitið verður: "Umsitingarligar reglur fyri bíðilistan til grundstykki og íbíðir".

Uppskotið til reglugerð fyri bíðilista til grundstykki og íbúðir og uppskotið til umsitingarligar reglur fyri bíðilistan til grundstykki og íbúðir verða eftir hesum orðað soleiðis:

**Uppskot til reglugerð fyri bíðilista til grundstykki og íbúðir**

1. Reglugerðin er galdandi fyri allar útstykkingar og annað, har lendið er fingið til vega frá Tórshavnar kommunu til grundstykki og íbúðir.

2. Umsøkjarin verður skrásettur á bíðilistan í raðfylgju eftir umsóknardegi.

3. Við grundstykki verður skilt grundstykki til vanlig sethús og grundstykki til tvíhús, raðhús og líknandi, uttan mun til, um bygt er á stykkinum ella ikki.

   Við íbúð verður skilt eigaraíbúð sambært eigaraíbúðarlógini.

4. Umsøkjarin kann velja at seta seg fyri hesi øki:

   a) Tórshavn
   b) Argir
   c) Hoyvík
   d) Kaldbak
   e) Hvítanes
   f) Kollafjørður
   g) Norðradalur

h) Syðradalur
i) Kirkjubøur
j) Velbastaður
k) Nólsoy
l) Hest

Til ber hjá umsøkjara at skráseta seg fyri fleiri øki. Men tó kann bert verða boðið honum grundstykki ella íbúð í einum øki.

Serligt umsóknarblað skal verða fylgt út, har umsøkjarin millum annað raðfestir síni ynski.

5. Fyri at verða settur á listan og fáa grundstykki ella íbúð til ta tíð skal umsøkjarin:

   a) vera *skrásettur sum búgvandi í* Tórshavnar kommunu ella *fyribils* vera *fluttur úr kommununi* í útbúgvingarørindum ella arbeiðsørindum. Arbeiðsørindi kunnu ikki vara í meira enn trý ár, tó undantikið tí føri, tá hjúnafelagi framhaldandi hevur bústað í kommununi.

   b) ikki áður hava fingið grundstykki, har lendið er fingið til vega frá Tórshavnar kommunu.

   c) ikki eiga grundstykki í kommununi, ella um søkt verður um íbúð, ikki eiga íbúð í kommununi.

   d) vera fyltur 18 ár.

   Í sambandi við tillutan verða hjún og sambúgvandi mett sum ein umsøkjari. Verður tikið av tilboði, verður hjúnafelagin ella sambúgvin samstundis strikaður av listanum.

   Treytin í 5b er ikki galdandi fyri umsøkjarar, ið einans søkja um íbúð.

   Nærri reglur um freistir o.a. eru ásettar í umsitingarligu reglunum.

6. Umsøkjari, ið stendur fremst á listanum, fær fyrst boðið grundstykki ella íbúð. Er talan um nýggja útstykking, verður lutakast um, hvør skal hava hvørt stykki.

7. Umsøkjari, ið ikki tekur við bodnum grundstykki, kann verða standandi á sama stað á listanum, um hann ynskir tað.

   Tá ikki verður tikið av bodnum grundstykki, kemur umsøkjarin í bíðistøðu í 18 mánaðir, ella til umsøkjarin ógildar bíðistøðuna.

Verður ikki tikið av tilboði aðru fer, verður viðkomandi strikaður av bíðilistanum, men kann søkja av nýggjum.

8. Umsøkjari, ið tekur við bodnum grundstykki, verður strikaður av listanum. Letur hann grundstykkið inn aftur, áðrenn byggiváttan fyriliggur, kann hann koma á listan aftur, men skal søkja av nýggjum.

9. Umsøkjari, ið ikki tekur við tilboði um íbúð, kann verða standandi á listanum, um hann ynskir tað, og verður hann standandi á sama stað.

10. Umsøkjari, ið tekur við tilboði um íbúð, verður strikaður av listanum.

    Umsøkjari, ið hevur tikið av tilboði um íbúð, kann tó søkja av nýggjum eftir reglunum í pkt. 5, men tá bara til grundstykki og bara ta einu ferðina.

11. Er umsøkjari ikki byrjaður at byggja á tillutaðum grundstykki 2 ár eftir, at byggiloyvi kann verða givið, hevur kommunan rætt, men ikki skyldu til, at krevja grundstykkið aftur móti at rinda sama prís fyri grundstykkið, sum umsøkjarin rindaði.

    Somuleiðis kann eitt stykki verða tikið aftur, um umsøkjarin, áðrenn bygging er byrjað, gerst eigari av grundstykki í kommununi.

12. Býráðið kann í undantaksføri víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð um serlig viðurskifti hjá umsøkjaranum greitt tala fyri hesum.

**Uppskot til umsitingarligar reglur fyri bíðilistan til grundstykki og íbúðir**

**Meginreglan:**
Meginreglan fyri at verða uppskrivaður á umsóknarlistan er, at umsøkjarin skal vera skrásettur í Tórshavnar kommunu ella vera fráfluttur í útbúgvingarørindum ella arbeiðsørindum.

**Útbúgvingarørindi:**
Útbúgvingarørindi verða tulkað sum at lesa á lærustovni ella vera lærlingur.

Skjalprógvast skal, við váttan frá lærustovni ella læruplássi, at umsøkjarin er undir útbúgving.

Tíðarskeiðið, umsøkjarin verður standandi á bíðilista, er fimm ár. Eftir fimm ár skal annaðhvørt ár skjalprógvast av nýggjum, at umsøkjarin er undir útbúgving. Skriv verður sent.

**Arbeiðsørindi:**
Arbeiðsørindi verða tulkað sum sendur av føroyskum arbeiðsgevara í arbeiðsørindum.

Sum prógv skal váttan frá arbeiðsgevara vera til skjals.

Tíðarskeiðið fyri stakan persón og húski er, at umsøkjarin verður standandi trý ár á umsóknarlistanum. Eftir trimum árum verður viðkomandi strikaður. Fráboðan verður send.

**Tíðarskeiðið** fyri hjúnafelaga er, at umsøkjarin verður standandi á umsóknarlistanum, so leingi hjúnafelagin hevur bústað í kommununi.

**Arbeiðsroyndir uttanlands:**
Hildið verður, at arbeiðsroynd skal vera gildug orsøk fyri at verða skrásettur á umsóknarlistanum, javnsett við útbúgvingarørindi, um so er at umsøkjarin, beint eftir lokna útbúgving, fær sær starv uttanlands við tí í hyggju at nema sær royndir fyri síðani at koma heim innan trý ár.

Sum prógv skal váttan um lokna útbúgving vera til skjals.

Tíðarskeiðið fyri stakan persón og húski er, at eftir trimum árum verður umsøkjarin strikaður av umsóknarlistanum. Fráboðan verður send.

Tíðarskeiðið fyri hjúnafelaga er, at umsøkjarin verður standandi á umsóknarlistanum, so leingi hjúnafelagin hevur bústað í kommununi.

**Arbeiðsroyndir við farloyvi:**
Arbeiðsroyndir, við farloyvi frá føroyskum arbeiðsgevara, verða mettar sum gildug orsøk, og kann umsøkjarin verða standandi á umsóknarlistanum.

Farloyvi skal skjalprógvast við váttan frá arbeiðsgevara.

Tíðarskeiðið fyri stakan persón og húski er, at eftir trimum árum verður viðkomandi strikaður av listanum. Fráboðan verður send.

Tíðarskeiðið fyri hjúnafelaga er, at umsøkjarin verður standandi á umsóknarlistanum, so leingi hjúnafelagin hevur bústað í kommununi.

**Afturtøka av grundstykki:**
Innan tvey ár eru liðin, skal verða bygt á grundstykkið

Grundstykkið verður tikið inn aftur um

- ikki er byrjað at byggja, eftir at freistin er úti
- ein hevur arvað hóskandi sethús ella grundstykki
- ein hevur keypt ella fingið annað hóskandi grundstykki til sethús
- ein hevur keypt ella fingið hóskandi sethús

**Ivamál:**
Eru ivamál, verður málið sent víðari sambært reglugerðum og mannagongdum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna reglugerðina.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**269/05** **2001-0545**

**Traðir, yvirlit, sáttmálar, eftirlit, broytingar**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyri at skipa regluligt eftirlit við traðum og traðarleigumálunum hevur umsitingin gjørt:

1. Yvirlit og kort yvir traðirnar, ið vísa matr. nr. stødd, stað og hvør leigarin er.
2. Kannað sáttmálar. Tað eru 5-6 ymiskir sáttmálar.
3. Uppskot er gjørt til skriv og eftirlitsskjal at senda til allar leigarar, og
4. Mannagongd til at skipa traðarsýn eina ferð um árið fyri hvørja trøð.
5. Uppskot gjørt til at broyta sáttmálan og fáa í sáttmálan ásetingar um uppsøgn og uppsagnartíð.
6. Uppskot til endurskoðan sáttmála at senda út saman við eftirlitsskrivinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum eftir omanfyri nevnda leisti, at leggja fyri aftur á komandi fundi.

**Fylgiskjøl:**
Eftirlitsskjal
Traðarsýn
Høvuðstreytir
Kort við traðum
Listi yvir traðarleigarar
Traðarsáttmálar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2004:** Útsett

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. april 2004:** Málið varð umrøtt, og framlagda skrivliga tilfarið verður sent nevndarlimunum til kunningar, innan málið verður viðgjørt aftur á øðrum fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. mai 2004:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger tilmæli til komandi fund.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja

1. skriv til allar traðarleigarar
2. eftirlitsskjal
3. mannagongd til traðarsýn
4. broytingar í sáttmálanum um uppsøgn v.m.
5. endurskoðaðan sáttmála
6. reglur um ættaliðsskifti, sum nevndar í høvuðstreytum
7. skipan av bíðilistanum

og at leggja broytingar í sáttmálanum fyri fíggjarnevndina, umframt skjalið við høvuðstreytum, og at arbeitt verður víðari við skipan av bíðilistanum.

**Byggi – og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at senda málið til ummælis hjá Havnar Traðarmannafelag.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið á Ráðhúsinum tann 25. oktober 2004 við traðarmannafelagið. Felagið hevði uppskot til ymiskar broytingar og orðingar.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at samtykkja

1. skriv til allar traðarleigarar
2. eftirlitsskjal
3. mannagongd til traðarsýn
4. endurskoðaða traðarleigusáttmála, um uppsøgn v.m
5. skipan av bíðilista til traðarumsóknir
6. reglur um ættarliðsskifti

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Umrøtt og verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið til leigusáttmála.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

270/05 2005-2342 (gl. 40/6. 1995)

Mál um vendipláss við vegendan uppi á Gørðum í Kaldbak.

**Tekniska nevndin 30. mars 1998:** Samtykt at samráðast við Olinu Skorá um øki til vendipláss.

**Ískoyti:**
Býarverkfrøðingurin hevur fingið boð, at Olina Skorá og Karl Vang, sum er medeigari, einki vilja lata.

**Tekniska nevndin 18. mai 1998:** Býarverkfrøðingurin hevur á skitsu, dagfest 14. desember 1995 víst á vegtekniskt forsvarligastu loysn.

Samtykt at taka undir við loysn býarverkfrøðingsins og at mæla til ognartøku samsvarandi hesum.

**Fíggjarnevndin 28. mai 1998:** Samtykt at leggja málið fyri kaldbaksnevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 28. mai 1998:** Kunnað varð um gongdina í málinum.

**Kaldbaksnevndin 24. november 1998:** Samtykt at taka undir við teknisku nevndini.

**Kaldbaksnevndin 14. september 2005:** Nevndin mælir til at loysa hetta gamla mál við ognartøku um neyðugt.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at kunnað verður um gongdina, og at tekningar av ætlanini verða lagdar fram vísandi til, at á seinasta fundi 14. september 2005 bleiv mælt til at fara víðari við hesum máli.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2005:** Nevndin vísir til tilmæli 14. september 2005 og mælir til at loysa málið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at ognartaka neyðug lendi til vendipláss.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum at ognartaka uml. 300 m² við skráa burtur av matr. nr. 36a í Kaldbak.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**271/05** **2005-3077**

**Standmynd "Kavarin" av Hans Paula Olsen uttan fyri Svimjihøllina í Gundadali**.

Ætlanin er at seta standmyndina á økið eystan fyri høvuðsinngongina hjá Svimjihøllini.

Støddin á standmyndini er:

| | |
|---|---|
| Hædd | 470 cm |
| Tjúgd | 55 cm |
| Breidd | 225 cm |

Kavarin stingur út frá steininum umleið 140 cm til hvørja síðu, t.v.s., at samlaða breiddin er umleið 335 cm.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fíggja standmyndina "Kavarin" av íløgum á mentamálaøkinum yvir 3 ár.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 850.000 av íløgum yvir 3 ár.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**272/05** **2005-2482**

**Umsókn um byggiloyvi til kryoanleggi á Landssjúkrahúsinum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Veri Con søkir vegna Landssjúkrahúsið um byggiloyvi til uppsetan av kryoanleggi. Tangin, ið er 1.6 metrar í diametur og 4.7 metrar høgur, skal nýtast til oxygengoymslu.

Tangin verður sambært innsendu tekningum settur upp í skráningin niðan fyri parkeringsplássið hjá Landsjúkrahúsinum á matr. nr. 970a, Tórshavn. Eigari av matriklinum er Tórshavnar kommuna. Økið er útleigað til Havnar Róðrarfelag

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í umráðispartinum D3.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Grundstykkið, matr.nr. 970a, er 52635 m².

Ábygt verður eitt kryoanlegg, planeringsvídd uml. 5x5 $m^2$.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn + tekningarj. nr. 2005-2482/1.
Viðm. frá brunaumsj. j. nr. 2005-2482/2.
Nýtt skriv til Brunaumsj./Arbeiðseftirlitið j. nr. 2005-2482/3.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at senda málið grannahoyringar hjá Havnar róðrarfelag, og um einki mótmæli kemur at geva byggiloyvi til tangan treytað av góðkenning frá øðrum myndugleikum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
22.11.05
Málið hevur verið til grannahoyringar hjá Havnar Róðrarfelag, og einki mótmæli er innkomið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at geva byggiloyvi til ætlaðu bygging treytað av góðkenning frá øðrum myndugleikum.

Mælt verður til at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við keyp av lendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Landssjúkrahusinum 25 m² fyri kr. 300,00 um árið, fyribils í 5 ár.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Nú kom Høgni Mikkelsen

**273/05** **<u>2003-2075</u>**

**<u>Miðstaðarøkið í sambandi við útstykkingina í Hoyvíkshaganum Suður</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur eftir áheitan frá leiðsluni, gjørt uppskot til byggiætlan fyri bæði vinnustykkini, ið eru partar av útstykkingini Hoyvíkshagin Suður.

Miðstaðarøkið í norðasta enda av Miðstaðarøkinum, sum nú er ætlanin at fara undir, er ein týdningarmikil partur av samlaðu útstykkingini í Hoyvíkshaganum. Hesin parturin av miðstaðarøkinum fer at veita tær allar mest neyðugu tænasturnar, sum ein býlingur hevur tørv á.

Miðstaðarøkið Norður í Hoyvík er partur av samlaða miðstaðnum í Hoyvík, sum røkkur frá kirkjuni við Vegin Langa og niðan til Miðstaðarøkið Norður, sum nú er ætlanin at byggja.

Miðstaðarøkið kemur at verða ásett eftir almennu byggisamtyktini A3.

Økið liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og verður bygt sambært eini serligari byggiætlan fyri hetta økið.

**Miðstaðaraøkið, norðasti partur:**
Økið er, býarskipanarliga sæð, byrjanin/endin á einari miðstaðargøtu, ið kemur at liggja sum ein strukturellur felagsnevnari fyri allan Hoyvíkshagan Suður. Tað er tískil umráðandi, at økið (Miðstaðarøkið norður), samstundis sum tað skal verða partur av miðstaðargøtuni, eisini tillagar seg sín kontekst, ið er sethúsabygging við bæði smærri og lægri eindum.

Økið er umleið 7.500 m², deilt sundur av einum vegi, ið er einasta atgongd til 500 m² grundstykkini, 400 m² grundstykkini og samanbygdu húsini ovast. Vegurin er lagdur millum vinnustykkini, og er harvið við til at leggja áherðslu á centrala leiklutin hjá økinum - bæði sum staðseting og funktión.

Byggiøkið - tey bæði vinnustykkini, verða deild upp í 6 byggifeltir, 3 á hvørjari síðu. Ímillum byggifeltini verða bilstøðlar og grøn øki.

**Hjálagt er:**
Frágeiðing um ætlanina j. nr. 200302075-2.

Tekning nr. 1, j. nr. 200302075-3.
Yvirlitsmynd av allari miðstaðargøtuni.
Tekning nr. 2, j. nr. 200302075-4.
Støðumynd av miðstaðarøkinum.
Tekning nr. 3, j. nr. 200302075-5.
Longdarskurður gjøgnum økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. november 2003:** Uppskotið varð framlagt, og samtykti nevndin at taka málið upp á einum seinri fundi, tá limirnir hava havt møguleika at kunna seg meira um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Málið útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2004:**
Samtykt at umsitingin ger nýtt uppskot at leggja fyri nevndina aftur, har fleiri bilstøðlar verða fyri hvønn fermetur, helst ein bilstøðil fyri hvørjar 25 fermetar.

**Ískoyti:**
Viðv. bilstøðlum á miðstaðarøkinum Norður:
Bygt øki í mesta lagi 3.500 $m^2$ - bruttofermetur.
P-øki 100 bilstøðlar - svarandi til 1 bilstøðil pr. 35 $m^{2.}$
Krav sambært byggisamt. 1 pr. 50 $m^{2.}$
Møguleiki at útvega 20-25 bilstøðlar afturat í økinum - svarandi til 1 bilstøðil pr. 28 $m^{2.}$

Talið á bilstøðlum verður næstan 50% hægri, enn byggisamtyktin krevur, við møguleika til at økja upp til 75% hægri, enn kravt verður í byggisamtyktini fyri økið.

Mett verður, at talið av bilstøðlum í mun til tað bygda økið er høgt, tá ið hugsað verður um nýtsluna á økinum. Tað bygda økið hevur eitt fjølbroytni í nýtslu, sum ger at útiøkini/p-økini styðja hvørjum øðrum í nýtslu. T.d. eru flest viðskiftafólk til handils dagligdagar eftir vanliga arbeiðstíð ella leygardagar, ímeðan aðrar tænastufunktiónir hava opið mitt á degi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. september 2004:** Samtykt at hoyra møguligar umsøkjarar og áhugað um ætlanina, at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Samtykt at selja til kostprís og at áseta sølutreytir sambært ásetingini hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til skipan av miðstaðarøkinum í Hoyvíkshaganum saman við Karlamagnusarbreyt. Sí kortskjal í ringbindinum "Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum".

Eisini hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri hetta økið. Sí uppskot í ringbindinum ”Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum”.

Miðstaðargøtan er deild upp í 7 byggistig, við 8-10 byggifeltum í hvørjum byggistigið. Innanfyri hvørt byggistig verða øll felagsøkini millum bygningarnar deild ímillum hesi 6-10 byggifeltini. Sí kortskjal í ringbindinum ”Serstøk byggisamtykt fyri Miðstaðargøtuna í Hoyvíkshaganum”.

**Felagsøkini/p-økini:**
Hesi felagsøkini verða í stóran mun parkeringsøki, men kunnu eisini verða grøn øki ella meira skipað fríøki.

Ein grund til at umsitingin metir tað verða rættast, at fleiri byggifelt eiga felagsøkini/p-økini saman er, at tey bygdu økini hava eitt fjølbroytni í nýtslu, sum ger at útiøkini/p-økini styðja hvørjum øðrum í nýtslu. T.d. eru flest viðskiftafólk til handils dagligdagar eftir vanliga arbeiðstíð ella leygardagar, ímeðan aðrar tænastufunktiónir hava opið mitt á degi.

Harafturat er ynskiligt at gera eina miðstaðargøtu, har fólk fara at trívast. Tí skulu parkeringsøkini ikki gerast ov stór, so hesi ikki gera frástøðurnar millum bygningarnar fram við Karlamagnusarbreyt ov stórar. Somuleiðis skulu avstandirnir til býlingarnar, ið liggja fram við Miðstaðarøkinum, haldast tætt at Miðstaðarøkinum, og skulu hesi øki útformast/sniðgevast soleiðis, at hesi øki verða ein góð yvirgongd millum býlingarnar og Miðstaðarøkið.

**Søla:**
Ætlanin er at grundøkini skulu seljast eftir sama leisti sum við Óðinshædd. Umsøkjarin keypir eitt byggifelti, har hann kann byggja 100% á. Til byggifelti hoyrir ein prosentpartur av felagsøkinum ímillum bygningarnar. Mest loyvda hædd av bygningi, er ávíst fyri hvørt byggifelti sær.

Støddin av teimum 6 grundøkini í hesum byggistignum eru:

| Byggifelt nr. | Byggifelt $m^2$ | Partur av felagsøki % | Felagsøki $m^2$ | Grundøki tilsamans $m^2$ |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| 46 | 962 | 30 | 706 | 1668 |
| 48 | 592 | 18 | 424 | 1016 |
| 50 | 213 | 7 | 165 | 378 |
| 51 | 327 | 10 | 236 | 563 |
| 52 | 598 | 19 | 447 | 1045 |
| 53 | 524 | 16 | 377 | 901 |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við uppskotinum um skipan av økinum, og at nevndin mælir fíggjarnevndini til, at økini verða seld eftir leistinum, sum umsitingin hevur skotið upp.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**274/05** **<u>2003-2323</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til skrivstovubygning á matr. nr. 425, Tórshavn</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Arkitektavirkið Magnus Hansen søkir, vegna Petur Olsen, við umsókn, dagfest 25. november 2003, um byggiloyvi til skrivstovubygning á matr. nr. 425, Tórshavn.

Talan er um bygning við 5 hæddum, hvør hæddin uml. 290 m² til víddar. Bygningurin er 13,4 m høgur, mált frá miðaljørðildi til ovasta punkt á stáldragaranum á framsíðuni, og 12,60 m høgur, mált frá miðaljørðildi til ovasta punkt á glasframsíðuni.

Framsíðan móti Tinghúsvegnun er úr stáli og myrkum glasi, meðan aðrar sjónligar síður verða klæddar við granitplátum.

**Lógir og ásetingar:**
Økið liggur í 1. grundumráði og er viðgjørt sambært galdandi ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Grundstykkið, matr.nr. 425, er 587 m².

Nettonýtslustigið verður 1,98, vísandi til ásetingarnar fyri økið kann nettonýtslustig fyri eitt náttúrliga avmarkað øki verða 2,0.

Kap. IV, § 2.

6. *Kortini eru gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 2,0.*

Byggistigið verður 0,50, mest loyvda byggistig er 0,60.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j. nr. 200302323-BYGM
Byggimálið Havnar Klubbi, j. nr. 7/3. 1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin gongur umsóknini á møti, grundað á, at ætlaða byggingin lýkur ásetingarnar í almennu byggisamtyktini.

Tilmælið er treytað av, at heildarætlan verður gjørd fyri økið, Tinghúsvegurin frá Jacob Lützen niðan til Bøkjarabrekku.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nettonýtslustigið verður 1,98, mest loyvda nettonýtslustig er 1,0.

Tal av bilstøðlum: 6 til 8, kravt tal av bilstøðlum er 23.

**Skjøl:**
Umsókn j. nr. 2003-2323/1.
Tekningar j. nr. 2003-2323/2.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til

<u>at</u> ásetingarnar fyri matr.nr. 425 ikki eru broyttar sambært ætlaðu heildarætlan fyri Tinghúsvegin.

<u>at</u> nettonýtslustigið verður 1,98, meðan mest loyvda nettonýtslustig er 1,0.

<u>at</u> tal av bilstøðlum er 6 til 8, kravt tal av bilstøðlum er 23.

<u>at</u> sambært verandi ásetingum kunnu bert verða bygd hús við kjallara, 3 hæddum og nýttum lofti. (Nýtiligt loft er at skilja sum loft við skráveggjum).

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin 30. mai 2005.

Ein minniluti, Bjarti Mohr og Sjúrður Olsen, tekur undir við tilmælinum til fundin 1. mars 2004.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin er komin við nýggjum projekti.

Bygningurin hevur kjallara, tríggjar hæddir og innrættað loft, so sum ásetingarnar í byggisamtyktini áseta.

**Upplýsingar frá fyrisitingini:**
Grundstykkið, matr.nr. 425, er 587 $m^2$.

Ábygt verður ein skrivstovubygningur, vídd 587 $m^2$.

Byggistigið verður 0,6, mest loyvda byggistig er 0,6.
Nettonýtslustigið verður 1,0, mest loyvda nettonýtslustig er 1,0.

Tal av bilstøðlum: 12, kravt tal av bilstøðlum er 12.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at senda málið til kunningar hjá grannunum, innan støða verður tikin í málinum, vísandi til at bygt verður í mark móti suðri og norði, og í hesum sambandi verða brandmúrar í mark.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Nevndin samytkti at biðja umsitingina lýsa verkætlanina náðgreiniligari, eisini í mun til umhvørvið og grannalagið.

**Ískoyti:**
Umsøkjarin hevur latið gjørt model og tekningar av bygninginum og grannalagnum.

Kommunan hevur áður veitt peningaligan stuðul til varðveiting og endurbøting av húsunum, sum í dag standa á ognini, tí tey hava verið mett at vera varðveitingarverd í sjálvum sær og fyri umhvørvið í miðbýnum.

Mentamálaráðið hevur í brævi 6. apríl 2005 tikið undir við hesum sjónarmiði, men hevur tó ikki hildið tað vera rætt beinleiðis at friða hetta einstaka hús sambært fornfirðingarlógini.

Umsøkjarin hevur í brævi til Tórshavnar kommunu 7. apríl 2005 víst til almenna og politiska orðaskiftið ímóti nýbygging á ognini, samstundis sum hann hevur víst til, at hann sambært galdandi byggisamtykt kann byggja.

Umsøkjarin sigur samstundis, at hann er til reiðar at koma til samráðingar við kommununa um viðurskiftini.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at kommunan tekur upp samráðingar við umsøkjaran um møguliga yvirtøku av ognini Degnshús við tilhoyrandi matr. nr. 425 í Tórshavn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. oktober 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jacobsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjarti Mohr og Sjúrður Olsen, mælir til at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti vísandi til, at hon er í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við ánaran av matr. nr. 425 í Tórshavn um møguliga yvirtøku av ognini.

Ánarin er sinnaður at lata kommununi ognina fyri 5 mió. kr., sum skulu gjaldast í hondina, tá skeytið er tinglýst uttan præjudicerandi rættarviðmerkingar og treytað av, at ognin við ábygdum bygningi ikki kann avhendast øðrum, uttan við góðkenning frá Peturi Olsen, eins og hann ella eftirkomarar hansara í beinleiðis linju – um ognin verður avhendað triðjamanni – kann yvirtaka hana eftir somu treytum sum standa í uppskotinum til skeyti, og til ein keypsprís uppá kr. 5 mió, og skal hesin servituttur verður galdandi í 60 ár, og gongur út 31. desember 2065.

Yvirtøkudagin verður dagurin, skeytið verður undirskrivað av seljara og keypara.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin vísir á,

at talan er um eini gomul og smá sethús í miðbýnum, sum nýliga eru umvæld. Grundstykkið er 587 m² til víddar; ánarin hevur keypt ognina í 2004 fyri 1,8 mió. kr.
at rentan og inflatiónin hava verið lág hesu seinastu árini,
at húsaprísirnir eru farnir nógv upp, serliga tætt við miðbýin,
at hesi húsini eru mett varðveitingarverd av serkønum,
at nærmastu grannar eru Havnar Bio og handils- og sethúsini hjá Jacob Lützen,
at Tórshavnar kommuna eigur tvey varðveitt hús í grannalagnum við Tinghúsvegin, nevniliga Sloans- og Heinesens hús, og
at til ber at flyta varveitingarverd hús á annað øki.

Vísandi til omanfyristandandi og til strongu søluteytirnar mælir kommunustjórin frá at keypa ognina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at keypa ognina fyri kr. 5.000.000,00 uttan bindingar av nøkrum slag at fíggja av íløgum.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, metir tað vera skeivt at blanda byggimálið saman við møguligum keyp av ognini og mælir býráðnum frá at keypa ognina.

**Býráðið 15. desember 2005:** Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen um at virðismeta húsini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Høgni Mikkelsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Høgni Mikkelsen.

Fundurin varð niðurlagdur kl. 19:23 og uppafturtikin kl. 19:45.

Jan Christiansen møtti aftur á fundi og las upp viðmerkingar til dagskránna, ið vórðu førdar í gerðarbókina.

Jan Christiansen fór aftur av fundi.

**275/05** **1999-2887**

**Skriv frá sp/f Jónfinni Thomsen, adv., dagfest 14. oktober 2005, fyri Sámal og Hanus á Krákusteini viðv. ognartiknum lendi til Eysturskúlan.**

Í sambandi við byggingina av Eysturskúlanum ognartók kommunan meginpartin av trøðni hjá Krákusteini.

Alt økið var ikki nýtt, og fyrrverandi eigararnir hava tí brúkt tað til beiti, men søkja teir nú um at fáa tað aftur við tí grundgeving, at ein ognartøka ikki skal fevna um størri øki enn neyðugt.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at selja umbidna økið uppá áleið 1320 m², sum upprunaliga var ognartikið til skúlabygging, fyri kr. 80 pr. m² treytað av, at góðkend útstykkingarætlan fyriliggur og loyvi frá landsstýrinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**276/05** **2004-2402**

**Umsókn frá p.f. Klement Petersen, dagfest 17. oktober 2005, um leingjan av leigumáli teirra í Flatnahaga.**

Søkt verður um at fáa leigusáttmálan um øki til dynamitthús broyttan til at vera ein 10 ára leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at leingja sáttmálan til 9 ár.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**277/05** **2005-3125**

**Útstykkingin eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking 200, eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

Útstykkingin, sum er nevnd 200, hevur 64 grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru uml. 9 x 6 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru umleið 5,50 x 4 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir og útførdir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri útstykkingina 200, eystan fyri Karlamagnusarbreyt.

**Projektering:**
Útstykkingin verður í løtuni projekterað endaligt. Verandi projekt hevur verið gjøgnumgingið av byggideildini við lendisdeildini og byggimálsviðgerðum.

Eisini hevur projektið verið gjøgnumgingið av teknisku deild hvat viðvíkur vegum, atkomuviðurskifti og leiðingum.

Útstykkingin er øðrvísi enn vanligar útstykkingar og hevur tí verið eitt ávíst orðaskifti um møguligar trupulleikar, ið kunnu stinga upp. Ymiskir smálutir skulu framvegis fáast upp á pláss, serliga hvat viðvíkur leiðingum.

Projekteringin, ið er gjørd higartil av UP Verkfrøði, v/ Una Patursyni, vísir, at nøgdin av gróti, sum skal brúkast, svarar til nøgdina av gróti, sum verður tikið

burtur av projektinum við Karlamagnusarbreyt. Hetta svarar til umleið 15.000 kubik av gróti.

**Útbjóðing og avgrevstur:**
Ætlanin er at hetta yvirskotsgrótið verður flutt beinleiðis yvir í Útstykkingina 200 eystan fyri Karlamagnusarbreyt fyri at sleppa undan óneyðugari koyring gjøgnum økið í Hoyvíkshaganum.

Neyðugt er tí at grava moldina av økinum, har Útstykkingin 200 verður og møguliga gera arbeiðsveg fyri at koma til hesa arbeiðstøku.

Arbeiðið at grava av moldina og at gera arbeiðsveg er boðið út undirhonds til Guttesen & Staksberg (sum hevur arbeiðið við Karlamagnusarbreyt) og Articon.

| | |
|---|---|
| Guttesen & Staksberg hevur boðið | 795.000 kr. uttan MVG |
| Articon hevur boðið | 1.284.050 kr. uttan MVG |

Uni Paturson hevur kannað tilboðini, og hann mælir til at tikið verður av lægsta tilboði frá Guttesen & Staksberg áljóðandi 793.000 kr. + MVG.

Tilmæli:
Býararkitekturin mælir at til at tikið verður av lægsta tilboði frá Guttesen & Staksberg áljóðandi 793.000 kr. + MVG, og at avgrevsturin verður framdur, meðan grótið er í økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum frá Guttesen & Staksberg.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**278/05** **2004-1691**

**Byggjan av ítróttarbygningi (fimleikahallir) við norðara enda á Tórsvølli**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Byggideildin hevur gjørt eitt uppskot til bygging av norðara skýli á Tórsvølli.

Uppskotið er ætlað sum eitt boð uppá, hvussu skýlisbygningur kann kombinerast við privatar og almennar funktiónir upp at einum almennum útirúmi í form av einum torgi. Umráðandið hevur verið, at bygningur og útirúm spæla saman á ein hátt, sum leggur upp til, at aðrar komandi byggingar í økinum styrkja ”torgið”,

sum er ætlað at gerast eitt centralt øki í Havnini. Umráðandi hevur tískil verið, at stovuhæddin á allari bygging í økinum hevur eina almenna og eksterna funktión.

Somuleiðis eigur at verða lagt upp til ein byggistíl, sum kann førast aftur til økið og tað sermerktu funktión, sum økið er myndað av og virkar undir.

**Arkitektoniska sniðið**
Arkitektoniska sniðið er grundað á siðvænt stadionsbyggjarí tó soleiðis, at virksemið hjá ÍSF hevur myndað fasaduloysnir og innrætting.

ÍSF er sambandið hjá øllum sersambondunum og tískil myndað av fjølbroyttum virksemi og áhugamálum. Tó er tað eisini soleiðis, at ÍSF stendur sum felagsnevnara hjá øllum - leggur seg sum samlandi karmur um sersambondini.

Hesin metafysiski áskoðanarhátturin er grundarlagið undir fasaduloysnini, har roynt er at leggja áherðslu á konstruktiónir sum rammur um hølisinndeilingina, við øllum sínum skrivstovum til sersambondini og ymiskum funktiónum, sum sleppur at markera seg úti í fasaduni.

**Norðara tribuna á Tórsvølli**
- til alment endamál er í miðhæddini út til "ítróttartorgið"
- skrivstovuøkið er á 1. hædd
- ítróttarrúm eru í niðastu hædd

**Ásetingar fyri økið:**
Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Økið í Gundadali kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

Býráðið kann áseta í pørtum av grundumráði 1, 2 og 3, at ongar skrivstovur ella líknandi virksemi verður í veghædd.

Fyri at tryggja eitt alment myndað umhvørvi í økinum framyvir verður skotið upp, at ásetingar verða lisnar í skeytini, um at at ítrottar-, resturantións-, handils- og mentunavirksemi skulu verða í veghædd.

Eisini er ætlanin at arbeiða víðari við at útgreina tey øki/bygningar, ið skulu verða umfatað av hesum reglum.

**Funktión:**
Nýggja norður tribunan á Tórsvølli er ætlað sum ein blandaður skrivstovu- og almennur bygningur.

Ovasta hæddin er til skrivstovur til tey ymisku ÍSF sambondini. Vegginir eru uppbygdir í modulum, og tískil er møguleiki at flyta veggir, um tørvurin á skrivstovuhølum broytist við tíðini.

Miðhæddin er til almenn endamál, sum t.d. ítróttarsavn ella líknandi. Miðhæddin er opin og skal ætlandi virka sum ein týdningarmikil partur av nýggja "ítróttartorginum".

Niðasta hæddin skal rúma hallartengt ítróttarvirksemi. Rúm verður fyri fimleikahøllum og skiftingarhølum. Tey ymisku ítróttarsambondini hava stóran tørv á goymslurúmum, og tískil eru eisini tvey stór goymslurúm í kjallarahæddini.

**Frágreiðing av konstruktión:**
Teir berandi veggirnir í niðastu hæddini eru stoyptir á staðnum. Hetta er orsakað av, at kjallarin fyri ein stóran part er undir jørð, og tískil er trýstið stórt.

Mið- og 1. hæddin er bygd sum ein súlu/bjálka konstruktión. Súlur og bjálkar eru úr beton og berandi í facaduni. Hetta gevur møguleika at facadan verður bygd sum ein løtt, ikki berandi, stál / glas konstruktión.

Dekkið er ætlað sum spenndekk elementir. Spenndekk elementir hava eina stóra spennivídd, og er hetta sera týdningarmikið fyri at fáa eina fleksibla innrætting.

Takið er uppbygt av stálbjálkum, ið skulu bera eina lætta takkonstruktión.

Høvuðsinngongdin til bygningin er kjarnan í bygninginum. Tað er bygt upp við beton elementum og er berandi fyri vind trýstinum, ið er á bygningin.

Tey berandi elementini í bygninginum skulu ikki bert hava eina statiska funktión, men skulu eisini verða dekorativ.

Hetta gevur bygninginum dám av einari lættari konstruktión, ið fellur væl í umhvørvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000,00 av íløgum til byggiskrá.

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera byggiskrá til bygging av ítróttarbygningi at hýsa m.a. fimleikahallir í norðara enda av Tórsvølli. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisitingina og trivnaðarfyrisitingina.

Í sambandi við byggiskrá fyri bygningin skal hetta gerast í samstarvi við avvarðandi partar og feløg.

Byggiskráin verður at leggja fyri nevndina 19. oktober 2005.

Samtykt at seta kr. 300.000,00 av íløgunum til ger av byggiskrá.

Málið verður lagt fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu**.**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest oktober 2005, sum verður løgd fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Málið varð framlagt av Robert Thomassen, arkitekti, og verður viðgjørt á einum seinni fundi.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2005:** Nevndin viðgjørdi byggiskránna, og sendir hana, smb. politisku-fyrisitingarligu mannagongdini,

- í byggi- og býarskipanarnevndina at viðgera og góðkenna økið,
- í teknisku nevnd til viðgerð og góðkenning av tekniska partinum og
- í fíggjarnevndina at útvega lendi.

Síðani verður málið lagt fyri mentamálanevndina aftur, at taka støðu til byggiskránna og útbjóðingarhátt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðtaka byggiskránna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna, og at kunna grannarnar.

**Ískoyti:**
Málið verður viðgjørt á fundi í ferðslunevndini 9. november 2005. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundium í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at í byggiskránni fyri fimleika bygging við Tórsvøll, skulu framtíðar ferðslu- og parkeringsviðurskiftini verða frá økinum norðan fyri ÍSF-húsini. Verður bundið í verandi pláss norðan fyri Svimjihøllina, verður atkomuligt til HB- og B36 húsini.

Mælt verður eisini til at eingin almenn ferðsla eigur at verða á økinum við nýggja Torgið. Tó skal sjúkraflutningur og annar bráðfeingis flutningur at verða loyvdur á økinum.

**Tekniska nevnd 23. november 2005:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í arbeiðsbólkin, sum settur varð av mentamálanevndini 14. juni 2005, við ynski um at fáa eina ítøkiliga vegatekniska loysn við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við nevndina fyri Grunnin Tórsvøll, sum er sinnað at leiga nøktandi lendi til ítróttabygging og at gera leiguavtalu.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at gera avtalu við Grunnin Tórsvøll um leigu av neyðugum lendi.

**Ískoyti:**
Býarverkfrøðingurin hevur á fundi við arbeiðsbólkin umrøtt spurningin um ymsar vegatekniskar loysnir.

Greitt verður frá málinum á felagsfundi millum mentamálanevndina og teknisku nevndina.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at viðmæla fyriliggjandi byggiskrá.

Nevndin samtykti eisini, at umsitingin letur gera uppskot til vegatekniska loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 500.000,00 kr. til projektering.

**Ískoyti**
Í sambandi við at kommunan støðugt arbeiðir við at menna leistin fyri, hvussu byggimál hjá kommununi skulu skipast, og havandi í huga, at tað í hesum sambandi er umráðandi at ymiskar royndir verða gjørdar, so at valmøguleikar í sambandi við útbjóðing av arbeiðum í kommununi eru sannførandi og so nógvir sum gjørligt, mælir býararkitekturin til, at býráðið umhugsar annan leist enn tann, ið er umrøddur í mentamálasamtyktini 8. desember 2005.

Ístaðin fyri at lata gera prosjekt at lata til virki at bjóða eftir, metir býararkitekturin, at nevnda bygging er vælegnað til at lata gera sum heildararbeiðstøku (totalentreprisu), har kommunan við støðið í byggiskránni bjóðar 4-5 virkjum at gera uppskot til loysn. Tó skal ein slík loysn gerast sum samskipar arbeiðið við Tórshavnar kommunu og Tórsvøll. Hetta eigur tó ikki at vera nøkur forðing, og kann avgreiðast við innleiðandi samskifti, har fortreytirnar fyri snið og funktión verðaur útgreinaðar beinanvegin.

**Tilmæli:**
Grundað á omanfyrinevnda mælir býararkitekturin til, at arbeiðið at gera fimleikabygging við norðurendan av Tórsvøll verður framt sum heildararbeiðstøka bjóðað

út millum 3 føroysk virki og 2 útlendsk virki fyri at tryggja kapping við atliti til eitt fyri Tórshavnar kommunu nøktandi kostnaðarstøðið Í hesum sambandi eigur kommunan tó at tilskila sær rætt til ikki at taka av nøkrum av tilboðunum, men má tá gera sær greitt, at talan er tá um at arbeiðið ikki kann bjóðast út aftur í tíðarskeið uppá 6 mánaðir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjarti Mohr, mælir til einans at bjóða arbeiðið út millum føroyskar fyritøkur, men tekur annars undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við meirilutatilmælinum í mentamálanevndini og at velja Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen í bygginevndina eftir reglunum í § 36 í kommunulógini.

**279/05** **<u>2005-1092</u>**

**<u>Byggilendi í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Byggilendi í Kollafirði

**Kollfjarðarnevndin 19. apríl 2005:** Nevndin vísir á, at tørvur er á áleið 30 sethúsastykkjum í Kollafirði.

Semja er um at biðja býarverkfrøðingin/býararkitektin koma við hugskoti til, hvar útstykkjast kann til næsta fund.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Kári Finsson møtti fyri byggideildina og vísti á ymiskar møguleikar fyri sethúsastykkjum.

Nevndin heitir á kommununa um at útvega áleið 50 sethúsastykki í Kollafirði.

**Ískoyti:**
Vísandi til at tað er eitt stórt arbeiði at gera eina útstykking við 50 grundøkjum og kann taka rættiliga drúgva tíð, áðrenn nøkur hús verða bygd eftir einari slíkari ætlan, metir umsitingin, at tað er rættast at fara í gongd við nakrar smærri ætlanir fyri at loysa bráðneyðuga tørvin, ímeðan arbeitt verður við eini størri útstykking.

Umsitingin hevur hugt eftir økjum, sum er ogn hjá antin Jarðarráðnum ella privatum, sum eru áhugað í eini møguligari útstykking.

Onnur øki eru eisini í Kollafirði, bæði smærri og størri, men hesir eigarar eru ikki spurdir um teirra ætlanir fyri øki teirra.

Við teimum økjum, sum umsitingin metir verða væl egnað til útstykking í fyrstu atløgu, verða tilsamans eini 22 nýggj grundstykki. Hesi grundstykk eru býtt í fýra smærri útstykkingar.

1. Útstykkingin nakað norðari og oman fyri Lygnnes (uml. 3 grundstykki) er ogn hjá kommununi og hevur bert smærri tillagingar av fríøkinum við sær.

2. Útstykkingin oman fyri Lygnnes (uml. 8 grundstykki) er treytað av, at eigararnir eru fyri eini útstykking. Kommunan hevur óformelt tosað við onkran av eigarunum og var ein positivur hugburður fyri eini møguligari útstykking. Eigararnir hava tó ikki enn sæð nakra endaliga útstykkingarætlan fyri økið, og skal hetta tí takast við stórum fyrivarni.

3. Útstykkingin undir Homrum (uml. 5 grundstykki) liggur í løtuni hjá Jarðarráðnum til viðgerðar.

4. Útstykkingin við Kjalnes (uml. 6 grundstykki) krevur eina broyting í byggisamtyktini.

Viðlagt eru 5 kortskjøl, sum vísa á omanfyri nevndu útstykkingar og teirra staðseting í bygdini.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlanum fyri framtíðar búsetingum í Kollafirði. Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir, at tekniska umsitingin fær tey fyrstu uml. 22 grundstykki, sum býarskipanardeildin hevur víst á, at arbeiða víðari við.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at kunna kollfjarðanevdnina um hetta arbeiði.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Uppskot kemur frá teknisku umsitingini, um hvar ein størri útstykking kann fara fram, og við uppskoti til broyting av byggisamtyktini í sambandi við hetta.

**Kollfjarðarnevndin 21. november 2005:** Kollfjarðarnevndin tekur undir við omanfyristandandi og vísir á, at møguleikar eru eisini fyri útstykking norður í Sundum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 7. november 2005 samtykti at broyta byggisamtyktina fyri eitt grundøki á Kjalnesi (mál nr. 2002-1350, Jóan Jakku Joensen) metir umsitingin, at tað er rætt at broyta eitt størri øki, soleiðis at tað verður pláss fyri 6 grundøkjum her.

Hetta er ein av teimum smærri útstykkingjunum, sum byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 13. juni 2005 samtykti, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við. Í heildarætlanini fyri Kollafjørð er hetta lagt út sum A3-øki.

Arbeitt verður eisini víðari við eini størri útstykking í hesum økinum.

Eisini hevur umsitingin hugt eftir einum øki norðuri í Sundunum, har pláss er fyri uml. 12 grundøkjum. Hetta øki eru 2 traðir, sum Føroya Jarðargrunnur eigur.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært hjáløgdum kortskjali, og at arbeitt verður víðari við økinum norðuri í Sundunum sum er byggilendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**280/05** **<u>2005-0781</u>**

**Umsókn um grundstykki á leigaðum øki á Sundi til jarn/metal endurnýtslu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um at leiga øki á Sundi. J. nr. 2005-0781-1 og 2.

Talan er um virksemi, sum fæst við at móttaka og skilja jarn og annað metal til víðari útflutning.

Vísandi til almennu byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu, har økið, ynski er um at leiga, liggur í umráðispartinum B9, sum júst er ætlað útflutningstengdum virksemi, er býarskipanarliga sæð onki til hindurs fyri, at slíkt virksemi kann staðsetast í økinum ynski er um.

Viðvíkjandi ynskini í umsóknini um tørv á lendi, kann vísast á økið vestan fyri Asfaltverkið, har útvegast kann øki uppá uml. 60 x 50 m, 3000 $m^2$.

Víðvíkjandi ætlanunum hjá umsøkjaranum at skipa seg, metir býararkitekturin tað verða óheppið, at alt virksemið ikki er undir taki. Vísast skal á, at ivasamt er, um ein ætlaður verjugarður kann bøta um útsjóndina, tá hugsað verður um, at landsvegurin liggur omanfyri økið.

Vísandi til økta áhugan fyri lendið inni á Sundi, og við atliti til at kommunan arbeiðir við at býta økið inni á Sundi í vinnuøki, B9 og havnaøki B1, vísir býararkitekturin á tørvin fyri einari skipanarætlan fyri økið, sum skal verða grundarlagið undir framtíðar útvegan av lendi.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin heitir á umsitingina um at gera eina skipanarætlan fyri økið inni á Sundi, har hædd verður tikið fyri teimum umsóknunum, sum hóska seg í økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at ganga umsóknini á møti og at leiga økið, sum er ávíst av byggideildini, eftir somu treytum sum p.f. Asfaltverkið, j. nr. 2004-0754, treytað av, at farið verður í gongd við verkætlanini innan 6 mánaðir.

**Býráðið 24. november 2005:** Atkvøtt var um uppskot frá Beate L. Samuelsen um at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina, sum var samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen, Halla Samuelsen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. desember 2005:** Nevndin staðfesti samtyktina hjá fíggjarnevndini 16. november 2005 og vísti á, at umsøkjarin verður álagdur at fylgja teimum treytum, ið heilsu- og umhvørvismyndugleikin setir, áðrenn farið verður undir virksemið og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**281/05** **2005-2384**

**Umsókn frá Poul Hansen, adv., dagfest 14. september 2005, um strikan av servitutti á matr. nr. 620ah- gistingarhúsið Skansin.**

Ynskt verður, at servitutturin

"um at einki virksemi, eftir meting amtsins, skuldi vera á ognini, sum forðaði fyri fiskaframleiðsluna á staðnum"

verður strikaður

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin.

**Havnanevndin 13. desember 2005:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**282/05** **2005-3145**

**Umsókn frá Advokatskrivstovuni, dagfest 1. desember 2005, viðv. matr. nr. 620u.**

Í sambandi við sølu av ognini hjá teimum verður biðið um loyvi, at servitutturin um forkeypsrætt verður strikaður.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til at loyva víðarisølu og at fasthalda forkeypsrættin.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at loyva víðarisølu og at strika servituttin um forkeypsrætt.

**Havnanevndin 13. desember 2005:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir og Katrin Dahl Jakobsen, tekur undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti,: Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, vísir til minniluta tilráðingina í fíggjarnevndini 7. desember 2005.

**Býráðið 15. desember 2005:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá havnanevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

**283/05** **2001-0643**

**Samanbinding av bryggjunum á Langasandi í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Tørvur:**
Í 2000, áðrenn samanleggingina millum Tórshavn og Kollafjørð, varð farið undir at gera ein 100m langa bryggju á Langasandi í Kollafirði. Hendan bryggjan bleiv gjørd, í sambandi við at ein stór frystigoymsla bleiv bygd á havnaøkinum.
Fyri at kunna nøkta tann tá akutta tørvin, bleiv bryggjan bygd 60m eystan fyri tað verðandi bryggjuna, framman fyri virkinum hjá Vestsalmon.

Í 2002 var farið undir at gera eina nýggja bryggju 100m eystan fyri bryggjuna framman fyri frystigoymsluni. Meðan hendan bryggjan var í ger, bleiv uppisjóvarvirkið hjá Kollafjørð Pelagic bygt.

Aftan á eina heldur stirvna byrjan, er rættulig gongd komin á virksemið á havnaøkinum.

Í 2003 vóru inntøkurnar fyri havnina í Kollafirði uml. 1,3 mió. kr.
Í 2005 eru inntøkurnar fyri havnina í Kollafirði mettar til 3,7 mió. kr.

Við verandi umstøðum, er bert møguligt at avgreiða 2 skip samstundis. Hetta ger, at tað oftani er trupult at avgreiða skipini, sum máa bíða, ella fara aðrastaðni.

Í september 2005, verður ein nýggj skerilinja tikin í brúk á uppisjóvarvirkinum, sum kemur at viðføra enn meira skipaferðslu.

Í felagsskrivi frá Kollafjord Pelagic, Kloosterboer og Samskip, dagfest 20. juni 2005, verður víst á ein vaksandi tørv á bryggjuplássi. Fyri at betra um umstøðurnar, mæla feløgini til, at byggja bryggjurnar saman, bæði millum Vestsalmon og Kloosterboer og millum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic. Eisini mæla feløgini til at víðka um havnaøki eystan fyri Kollafjord Pelagic.

Tórshavnar havn tekur undir við felagsskrivinum, og mælir í fyrsta umfari til, at bryggjurnar verða bygdar saman. Hóast tørvurin á størri øki eystan fyri Kollafjord Pelagic uttan iva kemur at vísa seg, verður mælt til at hetta verður útsett, og tikið uppaftur sum eitt sjálvstøðugt projekt.

**Úrdrag úr byggiprogrammi:**
Ein 60 m long bryggja millum Vestlaks og Kloosterboer, við 9,8 m dýpi.

Ein 100 m long bryggja millum Kloosterboer og Kollafjord Pelagic við 12m dýpi.

Bryggjurnar verða gjørdar úr spunsi, eins og verðandi bryggjur.

Útbyggingin broytir onki um umhvørvið, men ger økið meira ruddiligt.

Neyðugar instalatiónir verða lagdar í bryggjuna, so sum vatn, el og tangi til móttøku av dálkaðum vatni frá skipum.

Útbyggingin ávirkar ikki ferðsluna á havnaøkinum nevnivert.

Projektið er mett at kosta 22,6 mió. og byggitíðin er umleið eitt ár.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka undir byggiprogramminum, og at beina málið víðari sambært mannagongd fyri verkætlanir hjá havnanevndini.

**Havnarnevndin 29. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Samtykt at taka undir við byggiprogramminum og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Dispositiónsuppskot er gjørt og verður lagt fyri havnanevndina til góðkenningar.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at góðkenna dispositiónsuppskotið og at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Havnanevndin 15. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Licitatión var 5. desember 2005, og inn komu hesi tilboð:

| | |
|---|---|
| J.& K. Petersen: | 21.356.125 |
| Articon: | 20.848.438 |
| Byggitek: | 21.249.351 |
| Pihl & Søn: | 20.996.554 |

Kostnaður fyri projektering, eftirlit, príshækkingar og óvæntað er mettur til kr. 3.691.562,00.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá Articon, soleiðis at samlaða íløgujáttanin verður kr. 24.540.000,00.

**Havnanevndin 13. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**284/05** **2002-2772**

**Politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við verkætlarnir ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur hjá sosialu-, mentamála-, teknisku-, byggi- og býarskipanar-, heilsu- & umhvørvis-, havna- og fíggjarnevndunum við støði í stýris- og fundarskipanini.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tá ið kommunan fer undir at fyrireika bygging, umbygging ella keyp av ogn, er umráðandi, at fyrireikingararbeiðið verður væl fyriskipað, soleiðis at kommunan fær eitt gott úrslit, ið tekur seg væl út, hevur góðan kvalitet og er brúkaravinarlig. Eisini er umráðandi, at allir partar, sum náturliga eiga at verða við í projektinum, luttaka, soleiðis at eingir trupulleikar stinga seg upp seinni.

Fyri at náa hesum hevur serstaki ráðgevandi bólkurin endurskoðað gjørdu politisku/fyrisitingarligu mannagongdirnar fyri sosialu- og mentamálanevndirnar, og gjørt uppskot til politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir fyri teknisku-, byggi- & býarskipanar-, heilsu- & umhvørvis-, havna- og fíggjarnevndirnar við í støði í stýris- og fundarskipaninunum.

Uppskotini eru gjørd saman við kommunu- og tekniska stjóranum. Havnameistarin hevur verið við til at gera uppskotið viðvíkjandi havnanevndini, trivnaðarstjórin fekk ikki komið á fund vegna fund í mentamálanevndini, har deildarleiðarin hevði forfall. Trivnaðarstjórin hevur, eins og tekniski stjórin og

bólkalimirnir, fingið uppskotini til mannagongdir fyri sosialu- og mentamálanevndirnar til ummælis.

Trivnaðarstjórin hevur á seinni fundi verið við til at gera mannagongdirnar.

Serstaki ráðgevandi bólkurin heldur, at fíggjarnevndin eigur at samtykkja uppskotini, sum liggja í málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Útsett til næsta fíggjarnevndarfund.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. august 2004:** Samtykt við broytingum at leggja mannagongdirnar fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Fíggjarnevndin 12. september 2005:** Samtykt við broytingum at leggja mannagongdirnar fyri býráðið, og at aðrar politiskar/fyrisitingarligar mannagongdir verða rættaðar samsvarandi neyðugum tillagingum.

**Býráðið 15. september 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Býráðslimir halda mannagongdirnar verða í so stirvnar og halda tí at ásetingin, um at nevnd skal biðja býráðið, umvegis fíggjarnevndina, um heimild at brúka neyðugan pening til projektering av samtykta karminum fyri nýíløgur, eigur at verða strikað.

Orðaljóðið í næst síðsta petti í 1. stigi verður sostatt:

Sosiala nevndin tekur samanum, góðkennir byggiprogrammið og játtar neyðugan pening til projektering av samtykta karminum fyri nýíløgur.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nýtt uppskot til reglugerð verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Umrøtt og arbeitt verður víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna hetta uppskot til mannagongdir, sum er galdandi fyri allar faknevndir hjá býráðnum uttan havnanevndina

**<u>Politisk/fyrisitingarlig mannagongd fyri verkætlanir, sum skal fíggjast av konto fyri íløgur.</u>**

Tá ið kommunan fer í undir eina verkætlan, sum verður fíggjað av íløgum, (tað kann vera bygging, vegagerð, umbygging ella keyp av ogn), er umráðandi, at fyrireikingararbeiðið verður væl fyriskipað, soleiðis at kommunan fær eitt gott úrslit, ið tekur seg væl út, hevur góðan kvalitet og er brúkaravinarligt. Eisini er umráðandi, at allir partar, sum natúrliga eiga at vera við í verkætlanini, luttaka, soleiðis at eingir trupulleikar stinga seg upp seinni.

**Mannagongd:**

**1. stig**

Avvarðandi fasta nevnd vísir á tørv/hugskot til verkætlan, og leggur málið fyri býráðið (umvegis fíggjarnevndina) til samtyktar við ávísing til karmin fyri íløgur.

Fíggjarnevndin viðger fíggjarliga partin av verkætlanini og ger tilmæli til býráðið.

Tá býráðið hevur givið tilsøgn til verkætlanina, velur býráðið tveir býráðslimir í serstaka bygginevnd, eftir reglunum í § 36 í kommunulógini, um verkætlanin kostar meira enn 20 mió. kr. Er talan um minni verkætlan, kann býráðið gera av at velja ein býráðslim í bygginevndina.

Høvuðsuppgávan hjá serstøku bygginevndini verður at ráðgeva býráðnum og nevndunum, og at hava ábyrgd av, at verkætlanin verður framd í samsvari við politisku krøvini/ynskini og innan givnar íløgukarmar, t.e samtyktir, byggiprogrammið, skitsuuppskotið, kostnaðarmetingina og tíðarætlanina.

Borgarstjórin tilnevnir umboð fyri miðfyrisitingina, teknisku fyrisitingina og ta fyrisitingina, sum byggir, í bygginevndina. Borgarstjórin kann eisini tilnevna onnur at vera knýtt at bygginevndini í stytri ella longri skeið at loysa bundnar uppgávur.

Bygginevndin kunnar javnan borgarstjóran og kommunustjóran um gongdina í verkætlanini.

Avvarðandi fasta nevndin fær málið aftur úr býráðnum og biður bygginevndina um byggiprogramm, sum lýsir verkætlanina, ið kann fevna um:

- nýtslu
- stødd
- útbjóðingarhátt
- ávísing á hóskandi byggiøki
- uppskot til støðumynd
- atkomu- og ferðsluviðurskifti
- kostnaðarmeting
- rakstrarætlan
- tíðarætlan o.a.

og lýsir málið til politiska viðgerð.

Avvarðandi fasta nevnd viðger og góðkennir byggiprogrammið.

Byggi- og býarskipanarnevndin viðger og góðkennir øki at byggja á.

Tekniska nevnd viðger og góðkennir tekniska partin (leiðingar, ferðslu o.a.).

Fíggjarnevndin útvegar byggilendi.

Aðrar viðkomandi nevndir viðgera og góðkenna teirra part av verkætlanini.

Avvarðandi fasta nevnd tekur samanum, góðkennir byggiprogrammið og biður býráðið (umvegis fíggjarnevndina) um neyðugan pening til prosjektering av karminum fyri íløgur.

**2. stig**

Tekniski stjórin ávísir rokningar til útgjaldingar, sum eftirlititsumboðið og umboðið fyri teknisku fyrisitingina í bygginevndini frammanundan hevur váttað.

Tá byggiprogrammið er góðkent, letur bygginevndin gera skitsuuppskot í samráð við teknisku fyrisitingina.

Bygginevndin kann í samráð við teknisku fyrisitingina seta ráðgevarar at prosjektera og at hava eftirlit við verkætlanini.

Dispositiónsuppskot verður gjørt, sum faknevndin (nevndin) góðkennir.

Bygginevndin skipar fyri, at prosjektið verður gjørt liðugt, útvegar byggiloyvi og bjóðar verkætlanina út.

Bygginevdin ger tilmæli til nevndina við støði í innkomnum tilboðum og samlaðari kostnaðarmeting, har alt er íroknað, m.a. samlaði kostnaðurin av uttanumøki, innbúgvi og útgerð.

Nevndin tekur støðu til tilmælið og biður býráðið um fíggjarnevndina um góðkenning av tilmælinum frá bygginevndini og um heimild at brúka neyðugan pening til verkætlanina av karminum fyri íløgur.

Bygginevndin setir arbeiðið í verk í samráð við teknisku fyrisitingina, herundir m.a. gerð av sáttmálum við arbeiðstakarar, eftirlit, byggirokniskap, avhending og garanti.

**3. stig**
Innbúgv og útgerð.

Bygginevndin stendur í samráð við teknisku fyrisitingina fyri útboði og útveganum av størri innbúgvi og útgerð í sambandi við nýbygging, umbygging ella keyp av ogn. Bygginevndin ger í samráð við teknisku fyrisitingina projekt og kostnaðarmeting og biður um tilboð innan karmin fyri íløgur.

Um neyðugt verður hetta gjørt við ráðgeving.

Tekniska fyrisitingin ella leiðarin fyri verkætlanini, t.d. skúlanum ella barnagarðinum standa fyri útvegan av minni innbúgvi og útgerð innan ávísan karm.

| |
|---|
| Tekniski stjórin ávísir rokningar til útgjaldingar, sum nevndarumboðið fyri teknisku fyrisitingina í bygginevndini frammanundan hevur váttað.<br><br>**4. stig**<br>Eftirmeting at leggja fyri nevnd og fíggjarnevndina. |

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**285/05** **2005-1122**

**Ábøtur á Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum partur av støðuga arbeiðnum at halda við líka og bøta um viðurskiftini í miðbýnum og ásannandi, at verandi flísalegging á Niels Finsens gøtu er í ringum standi, hevur umsitingin gjørt uppskot til nýtt snið, tilfar og skipan. J. nr. 2005-1122.

Uppskotið leggur upp til, at ein 1-sporað koyribreyt verður asfaltløgd, endað við trimum røðum av chausses-steinum. Millum koyribreytina og gongubreytina verður skipaður ein geiri, har ljós, beinkir, ruskspannir og skeltir skulu verða. Lagt verður upp til, at flísarnar á gongubreytini verða skiftar til sama slag, sum er á gongubreytunum í miðbýnum annars - betongflísar við chausses-steinum ímillum.

Uppskotið leggur upp til, at gosvatnið á vegamótinum Sverrisgøta/ Niels Finsens gøta verður burturbeint, og tískil skal avgerð takast um, hvørt arbeiðið skal gerast í einum tveimum stigum.

Um so er, at avgjørt verður at gera arbeiðið í stigum, kann 1. partur vera at leggja asfalt, chausses-steinarnar og seta upp nýggjar lampur og beinkir tveimum teinum - av Vaglinum niðan til gosvatnið og frá gosvatninum niðan í Steinatún. Sí kortskjal 1. stig.

2. partur kann so vera at skifta flísarnar á gongubreytunum og at beina gosvatnið burtur. Sí kortskjal 2. stig. nr. 2005-1122.

Ætlanin er at byrja arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina í samband við at játta kr. 900.000 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur gjørt eitt nýtt uppskot. Í staðin fyri asfalt verða brúgvasteinar nýtt sum belegning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við nýggja tilmælinum og at kunna grannarnar í góðari tíð.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur saman við HMP consult gjørt útbjóðingartilfar. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 1.568.100 kr. íroknað mvg.

Mælt verður til at góðtaka uppskotið og at mæla fíggjarnevndini til at játta peningin umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, tekur undir við uppskotinum og beinir málið í teknisku nevnd.

Somuleiðis samtykti meirilutin at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við fíggjan av konto fríðkan av býnum 2005/2006 og at hava kunnandi fund við grannarnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til, at kunnandi fundur verður við grannarnar, áðrenn málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar tann 28. september 2005.

Samtykt at mæla býránum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 1.568.000 av íløgum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Málið framlagt.

**Ískoyti:**
2 virki vóru boðin at geva undirhondsboð uppá álegging av brúgvarsteinum í Niels Finsensgøta, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

| | |
| --- | --- |
| J & K Petersen | 3.633.592 kr. |
| Articon | 1.893.750 kr. |

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at byrja samráðingar við Articon um gerð av arbeiðinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at taka upp samráðingar við Articon.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon og at játta kr. 1.600.000,00 av íløgum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**286/05** **2005-3147**

**Umsókn frá Advokatfelagnum, dagfest 16. november 2005, viðv. matr. nr. 807c.**

Í sambandi við sølu av ognini hjá deyðsbúgvinum eftir Ceciliu Brockie verður biðið um loyvi, at servitutturin um forkeypsrætt verður strikaður.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**287/05** **2005-3099**

**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2006.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt at hava fund hesar hósdagar, kl. 18.00:

| | |
|---|---|
| 26. januar | 21. september |
| 23. februar | 26. oktober |
| 23. mars | 16. november |
| 27. apríl | 14. desember |
| 18. mai | |
| 8. juni | |
| 29. juni | |

**288/05** **2005-1538**

**Fíggjarætlan 2005- eykajáttan.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

| Endamál | Hækking á konto | | Upphædd |
|---|---|---|---|
| Vegir og gøtur | 11 | kr. | -1.805.000 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | -78.000 |
| Brennistøðin | 15 | - | 3.076.000 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | -3.541.000 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 2.375.000 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 98.000 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 45.000 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | 299.000 |
| Kollafjarðar skúlli | 24 | - | 783.000 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 1.100.000 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 170.000 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 527.000 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 1.026.000 |
| Eysturskúlin | 27 | - | 232.000 |
| Eysturskúlin | 27 | - | -1.511.000 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 214.000 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 232.000 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | 221.000 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | 115.000 |
| Argja skúli | 30 | - | -29.000 |
| Argja skúli | 30 | - | -838.000 |
| Býarsavnið | 34 | - | 222.000 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -692.000 |
| Svimjihøllin | 36 | . | -142.000 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | -482.000 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 1.652.000 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 406.000 |
| Nýútveganir | 63 | - | 2.482.000 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 3.078.000 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | 1.512.000 |
| Sethús | 81 | - | 501.000 |
| Onnur hús | 82 | - | -3.142.000 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 3.320.000 |
| Íløgur | 90 | - | 70.360.000 |
| Barnaansing | | - | 3.107.000 |

| | | |
|---|---|---|
| **Framfluttar játtanir íalt** | **kr.** | **84.893.000** |
| Rógvi Hansen, standmynd | - | 100.000 |
| Westward Ho | - | 500.000 |
| Samskipari Hoyvíkshagin Suður | - | 75.000 |
| Kunningarstovan | - | 12.000 |
| Skráseting av listaverkum | - | 100.000 |
| Marianne Clausen | - | 10.000 |
| Akvarium | - | 844.000 |
| Parkeringsskipanin, telduskrá | - | 300.000 |
| Mold á matr.nr. 37a | - | 200.000 |
| Argja skúli | - | 346.000 |
| Konto 60 | - | 800.000 |
| Løn konto 01 | - | 453.000 |
| Dr. Ingridar barnagarður | - | 40.000 |
| Vantandi barnaansing | - | 1.000.000 |
| Hvíldarheimið Naina | - | 360.000 |
| **Játtað av reguleringskonto íalt** | **kr.** | **5.140.000** |

**Flytingar millum konti:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Barnaansing | av konto 42 | á konto 59 | kr. | 890.000 |
| Hvítanes | av konto 56 | á konto 581 | - | 250.000 |

**Býráðið 24. november 2005:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 15. desember 2005:** Einmælt samtykt.

Høgni Mikkelsen fór av fundi fyri aðru ferð, honum var noktað at fáa viðmerking í gerðabókina, tí hann fór av fundi.

**Mál uttan fyri skrá:**

**289/05** 2001-0407

**Atkomuvegur til Havnar**

Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.
Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala veganetinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen

Nú kom Høgni Mikkelsen

**290/05** **2001-1587**

**Sankta Frants – nýbygging av smábarnaskúla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grundøki:**

| | | |
|---|---|---|
| Matr. nr. 779 f, stødd | 4846 fermetrar. | |
| Verandi ábygging | 1246 fermetrar | - ábygging 0,26. |
| Verandi nýtsluøki | 3300,85 fermetrar | - nettonýtslustig 0,68. |

Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3 og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðsumhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m²x16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.
Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum. Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

at alt ov nógv er bygt á økið sum er.
at ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.
at nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skógfriðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega, eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m²

Sambært hesum uppskoti, er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr.nr. 779b soleiðis, at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur, og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum tilber.

Henda ætlan innber, at matr.nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.
Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779 f upp á 4 m breiðan vegaskap.
Tekning j. nr. : 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a.
Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005.

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587 - 34.

Nýggj umsókn dagfest 24. juli 2003 var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j.nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779 f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246 fermetrar - ábygging 0,26.
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar - nettonýtslustig 0,68.

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið : 1676 : 6776 = 0,25. Nettonýtslustigið verður : 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779 a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779 a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779 b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779 a, standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779 a, og matr. nr. 779 b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býarарkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býarаrkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**<u>Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla</u>**.

Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendi er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.

Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 m².

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøðurnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:20**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Kári Árting | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |